

**»Tað er lítil meining í at hava málningar eftir Ingálv av Reyni, krystall og annað fínt inni, tá alt liggur sum eitt runudíki uttanfyri«**

*Litríki urtagarðurin sær út til at vera liðugur. Men ein urtagarðurin verður ongantíð og skal heldur ikki nakrantíð vera heilt liðugur. Eigarin finnur altíð uppá at broyta okkurt*

# Urtagarðurin er balsam fyri likam og sál



Tá ið Dan Reinert Petersen í 1984 fór undir at gera urtagarð í Fuglafirði, vóru fáir vakrir urtagarðar í bygdini. Men Urtagarðsfelagið, kappingin um vakrasta urtagarð og vetrarfriðingin hava havt við sær, at alt fleiri fáa sær urtagarðin sum ítriv

*Randi Jacobsen*

Vit eru á vitjan hjá Dan Reinert Petersen í Fløtugerð, ovast uppi í Fuglafirði. Henda dagin er lýtt, logn, og sólin er við at kaga fram.

Uttan um húsini er alt líka snøgt.

– Her var nakað so ófantaligt. Stórur jarðarmunur og næstan ógjørligt at koma til húsini. Konan Marjun júkaði, at eg mátti fara í gongd. Hon segði, at allir menn arbeiddu uttan um húsini, og tað var stór skomm, at eg bara sat inni og las, sigur Dan.

Hetta vildi hann ikki hava sitandi á sær, men hugurin var alt annað enn góður tá.

– Eg hevði ikki eyga fyri tí, og alt sá bara so meiningsleyst út.

Hann byrjaði í einum horni, og so skjótt sum hann hevði fylt eitt petti upp, plantaði hann í tað.

– Tá ið eg so sá, at tað riggaði, var eg spentur eftir at fáa meira at planta í, og soleiðis gleið arbeiðið fram, sigur Dan, sum fór undir arbeiðið í 1984.

Nú er hann fegin um, at Marjun gav honum sparkið at fara útum. Hon luttekur eisini í arbeiðinum, men hann hevur størri áhuga fyri plantum enn hon.

**Drúgt**

Eina ferð mundi hann mist mótið. Ein maður kom fram við og segði, at tað fór at taka minst 12 ár at fáa ein líkinda urtagarð. Hetta helt tó ikki, tí eftir átta árum var longu vakurt uttan um húsini.

Dan vaks upp í húsum við urtagarði, sum mamma hansara helt einsamøll. Tá hevði hann ikki áhuga fyri plantum, men okkurt man mamman kortini hava lagt